## Letur uppaftur

USA hevur gjørt av at lata sendistovuna í jemenska høvuðsstaðnum Sanaa uppaftur. Sendistovan bleiv stongd á nýggjárinum, tí ein felagsskapur við tilknýti til al-Qaeda hevði hótt við at søkja at amerikonskum málum í Jemen. Í gjár skutu jemenskir trygdarmenn tveir menn, sum høvdu tilknýti til al-Qaeda, og sambært myndugleikunum vóru tað teir, sum hóttu USA. Bretland og Frakland valdu eisini at lata sínar sendistovur í Sanaa aftur aftan á hóttanina ímóti teirri amerikonsku, men tær lata eisini uppaftur nú, skrivar Reuters.



## Noktar seg sekan

Maðurin, sum er skuldsettur fyri at hava skipað fyri einum hópdrápi í Filipsoyggjunum í november, noktaði seg sekan, tá hann kom fyri rættin í morgun. Datu Andal Ampatuan Jr., sum er borgarstjóri í einum lítlum býi á oynni Mindanao, er skuldsettur fyri at hava ábyrgdina av, at 57 fólk blivu myrd, tá vápnaðir menn lupu á tey tann 23. november. Millum tey myrdu vóru 30 tíðindafólk, sum fylgdu við valstríðnum upp undir tað komandi landspartavalið. Rættarmálið ímóti tí skuldsetta er í einum serligum hølum inni á løgregluhøvuðsstøðini í Manila.

# Kunnu bara lurta eftir sviknum pápum

**Felagið Børn uttan Rættindini fær lítið gjørt fyri at hjálpa pápum, sum hóast avtalu ikki sleppa at síggja síni børn. Frægasta hjálpin at geva teimum er bara at lurta, sigur Edith Dahl, forkvinna**

BØRN OG FORELDUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Hvat kann ein pápi gera, tá ið hann hevur fingið samveruresoultión gjøgnum Ríkisumboðið um at at hava barn sítt ávísar dagar, og mamman forðar honum í at síggja barnið?

- Mannagongdin er at fara til fútarættin, men eg veit, at fleiri pápar aftra seg við at fara so langt, sigur Edith Dahl, forkvinna í felagnum Børn uttan Rættindi.

Hon veit eisini okkurt dømi um, at tosað hevur verið at biðja barnaverndina um hjálp, og tá gekk betur, tí tað vildi mamman hóast alt ikki mátti henda.

Edith Dahl hevur um høgtíðina frætt frá fleiri ólukkuligum foreldrum, sum ikki hava sloppið, hóast resolutión frá Ríkisumboðnum um, at foreldrið skuldi hava barn sítt í eitt ávíst tal av døgum.

### Ringast hjá útisetum

- Tað er bara so, at foreldrið, sum hevur barnið, altíð kann seta forðingar av vegnum, og syrgiligastu ósemjurnar eru, tá ið hitt foreldrið býr uttanlands og bara kann síggja barn sítt við at koma heim, til dømis á jólum, sigur Edith Dahl.

Tað er ikki líka lætt at bróta avtalurnar, tá ið bæði forldrini búgva í landinum.

Edith Dahl sigur, at fleiri foreldur, sum ikki hava fingið loyvi at síggja barn sítt um høgtíðina, hava ringt til Børn uttan rættindi um høgtíðina, og tey í felagnum hava lítið annað kunnað hjálpt við enn at lurta. Í felagnum eru fólk, sum hava verið fyri tey sama, ella eru í somu støðu, og tey duga at lurta.

Tey, sum ringja, hava ofta nógv brúk fyri at tosa, tí støðan er so fast læst.

Edith Dahl sigur, at fleiri børn hava ilt við at skilja, hví myndugleikarnir skulu blandast uppi spurningin, nær tey skulu vera saman við mammuni og nær saman við pápnum.

- Børnini hugsa logist. Bara foreldrini tosaðu saman, var eingin trupulleiki, sigur Edith Dahl.

Felagið Børn uttan Rættindini hevur avmarkað arbeiðsorku. Tað er mest, tí ið mál taka seg upp sum nú um høgtíðina, at felagið virkar eftir ætlan.

### Tvey foreldur

Málið hjá felagnum er greitt:

Felagið arbeiðir fyri at tryggja øllum børnum, hvørs foreldur hava valt ikki at liva saman, rætt til gott og tætt samband við bæði foreldur.

Hetta skal vera ein rættur hjá børnunum og ein skylda hjá báðum foreldrum at virða.



*Tey flestu foreldur, sum ikki búgva saman, megna at semjast um samveruna við barnið, men viðhvørt setir tað, foreldið, sum hevur barnið, alsyns forðingar í vegin. Barnið er sum lús millum tvær negl og hevur einki at siga*

# Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags hækkar rentuna

**Grunnurin hækkar rentuna fyri eftirlønir til 5,0%, frá verandi 2,5%**

EFTIRLØN

Galdandi fyri 2009 hækkar rentan fyri eftirlønir úr eftirlønargrunni Havnar Handverkarafelags til 5,0% frá verandi 2,5%. Hesum boðar grunnurin frá í tíðindaskrivi.

Árið 2009 hevur roynst væl hjá Eftirlønargrunni Havnar Handverkarafelags. Millum annað hava lánsbrøvini staðið seg væl, men í aðar mátar hevur samlaða avkastið verið gott, og tí hevur nevndin fyri grunnin ásett rentuna fyri 2009 til 5%, sigur Sofus Joensen, nevndarformaður.

- Okkurt bendir á, at djúpa fíggjarkreppan er um at hæsa av, og støðan á fíggjarmarknaðinum er í broyting rætta vegin. Nevndin í grunninum fegnast um, at grunnurin er komin væl gjøgnum fíggjarkreppuna higartil, sigur Sofus Joensen.

Sofus Joensen sigur, at hann hevur kannað, hvussu er statt við rentum aðrastaðni, og støðan er hendan:

| | |
|---|---|
| Føroya Banki | 2,00% |
| Eik Banki | 2,10% |
| Norðoya Sparikassi | 2,25% |
| Suðuroyar Sparikassi | 2.85% |

| | |
|---|---|
| Lív | 2,50% (2009) |
| Lív | 3,50% (2010) |

- Rentumarginalurin (um tað kann brúkast) er sostatt frá 3% til 2,15% - tað sum vit bjóða meira, sigur Sofus Joensen, sum vísir á, at tey ikki kunnu annað enn fegnast um 2009. Limirnir skulu hava tað, teir hava uppiborið - ta bestu rentuna, sigur hann.